# Leiðsluskrivari

Av tí at leiðsluskrivari okkara fer í farloyvi, verður hetta starvið lýst leyst frá 21. juli 2008 til 18. mai 2009.

**Starvið fevnir um**
Høvuðsuppgávurnar hjá leiðsluskrivaranum eru at:

- Avgreiða mál vegna stjóra og leiðslu
- Stýra og umsita journal (Doculive), kundamóttøku, postmóttøku og samskifti annars
- Avgreiða telefon, kalendara, fundir og vitjanir
- Umsita starvsfólkamál

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tú

- hevur HH, skrivstovu- ella líknandi útbúgving
- hevur royndir innan tænastu og fyrisiting
- hevur kunnleika og royndir innan KT á brúkarastigi
- hevur góð evni at orða teg skrivliga og munnliga á føroyskum og norðurlendskum
- arbeiðir sjálvstøðugt og málrættað
- hevur góð samskiftis- og samstarvsevni
- ert álitandi og hevur góðan røkjuskap

**Stjóraskrivstovan**
Stjórin á SSL hevur ovastu leiðsluna og umsitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av virksemi stovnsins. Ábyrgdarøkið fevnir eisini um langtíðarráðlegging við ábyrgd fyri samskiping av ymsu deildunum og virkisøkjunum. Stjóraskrivstovan hevur ein týdningarmiklan leiklut at samskipa dagligu umsitingarligu uppgávurnar hjá leiðsluni.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, og er lønt í 4. lønarflokki.

**Umsóknir**
Umsóknin skal, saman við prógvum og møguligum ummælum, sendast til:

Strandfaraskip Landsins
Boks 30
810 Tvøroyri

**Umsóknarfreist**
Freistin at søkja starvið er 11. juli 2008 kl. 12:00.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Eyðhild Jacobsen, leiðsluskrivara, á tlf. 343000, ella við telduposti: eyj@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Løgmálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk. Fyrisitingin á SSL er skipað í fýra deildir: Samferðslu-, Sjó-, Fíggjar-, og KT-deild.



# KJ Norð trukk søkir *mekanikara* at byrja beinanvegin



Til verkstað okkara í Tórshavn søkja vit eftir einum mekanikara at byrja skjótast gjørligt.

Útbúgving sum trukk mekanikari, maskinsmiður ella bilmekanikari er ein fyrimunur, men ikki ein treyt.

Ert tú ágrýtin, hevur áræði og hug til at arbeiða á einum dynamiskum virki, so ert tú møguliga tann, ið vit leita eftir.

Eru spurningar, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Allan Norðfoss á telefon 588840.

Umsóknir mugu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 11. juli 2008.

Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Løn og treytir kunnu vit tosa nærri um.

KREA

KJ Norð Trukk fæst í høvuðsheitinum við sølu, útleigan og umvælan av trukkum og aðrari lyftiútgerð

NORÐ TRUKK
TRUKKAR & LYFTIÚTGERÐ

Mykinesgøta 3 · postboks 1315 · Tel 31 51 36 · Faks 310 931
info@nordtrukk.fo · www.nordtrukk.fo



almannastovan
www.almannastovan.fo

HTM
HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐIN

# BROYTTAR AVGREIÐSLUTÍÐIR



Frá 1. juli 2008 verða avgreiðslutíðirnar hjá Almannastovuni og Hjálpartólamiðstøðini broyttar soleiðis:

mánadag - hósdag
frá kl. **10**.00 til **15**.00

fríggjadag
frá kl. **10**.00 til **13**.00

KREA

**Almannastovan Tórshavn**
Tinghúsvegur 14
Postrúm 3096
FO-110 Tórshavn
Tel 353570, Faks 353571
torshavn@almannastovan.fo

**Almannastovan Norðoyggjar**
Klaksvíksvegur 78A
Postrúm 296
FO-710 Klaksvík
Tel 457240, Faks 457241
nordoyar@almannastovan.fo

**Almannastovan Suðuroy**
Sjógøta 3
Postrúm 58
FO-810 Tvøroyri
Tel 353560, Faks 353561
suduroy@almannastovan.fo

**Høvuðsskrivstovan**
Smyrilsv. 20, Postrúm 3096
FO-110 Tórshavn
Tel 353510, Faks 353511
almannastovan@
almannastovan.fo

**Almannastovan Eysturoy**
Heiðavegur
Postrúm 224
FO-610 Saltangará
Tel 474710, Faks 474711
eysturoy@almannastovan.fo

**Hjálpartólamiðstøðin (HTM)**
Brekkutún 3
Postrúm 1049
FO-110 Tórshavn
Tel 358300, Faks 358301
htm@almannastovan.fo



# matas



## Lærlingur

Ert tú tann rætta/ rætti til okkara handil?

Til handil okkara í SMS søknast vit eftir einum lærlingi.

**Vit bjóða**
Í lærutíðini fært tú eina fjølbroytta og áhugaverda útbúgving innan handil, vakurleikarøkt og heilsu.

Í Matas starvast 6 fólk og sum lærlingur, fært tú innlit í alskyns viðurskifti viðvíkjandi kundarøkt, sølu og innkeypi.

**Førleikakrøv**
Tað er eitt krav at tú hevur FHS-útbúgving, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og annars ert fyrikomandi og røkin.

Meira fæst at vita um starvið á tel 314888.

**Umsókn**
Skrivliga umsóknin, ið saman við próvskjølum, skal vera okkum í hendi innan 30. juni, kann sendast til:

**Matas**
Húsagøta · SMS · 100 Tórshavn
Att: Esther

SENDISTOVAN

Tel 31 48 88